Hugnalig jól

Aftur í ár var vælumtókta jólahaldið hildið jólaaftan á Lágargarði í Havn

JÓLAHALD

Orð: Ingrid Bjarnastein
Myndir: Jan Müller

Á hvørjum ári síðani Lágargarður byrjaði í 1987 hevur verið hildið jólahald fyri bú- og starvsfólkum jólaaftan. Hetta er ein siður, sum øllum dámar væl.

Áhugin fyri jólahaldinum er eisini stórur. So fyri at øll skulu fáa pláss og møguleika fyri at hoyra, hvat verður sagt, so hevur verið tørvur á at avmarka talið av gestunum. So fyri hvørt búfólk kunnu koma tvey vaksin saman við børnum.

200 fólk

Eins og undanfarin ár var so aftur í ár skipað fyri jólahaldið jólaaftan. Gestirnir byrjaðu at koma klokkan 13, so teir kundu hjálpa til

Hóast høgan aldur ber hon seg væl, mamma tvey kend andlit í føroyskum politikki

við at fáa búfólkið oman í felagshølið, har gudstænasta við Jóannes Fonsdal, presti, varð hildin.

Tórshavnar Manskór hevur eisini verið afturvendandi við kórsangi. Teir hava verið við so væl sum hvørt ár - tey fyrstu árini tó undantikin.

– Jólahaldið er ógvuliga hugnaligt, og tað er nakað bæði bú- og starvsfólk eru glað fyri, sigur Marjun Smith, leiðari á Lágargarði.

– Vit uppliva eisini, at tey, sum ætla sær heim at halda jól við familjuni, helst vilja verða her til jólahaldið eisini. Jólahaldið er nakað, hvørki bú- og starvsfólk høvdu viljað verið fyri uttan

Aftaná gudstænastuna verður dansað um jólatræið, og eisini kemur jólamaðurin á gátt við onkrum góðgæti til tey smáu. Síðani var møguligt hjá børnunum at hyggja sjónvarp og hugna sær við jólapakkanum, meðan tey vaksnu fingu borðreitt ein drekkamunn og heimabak frá køkinum á Lágargarði.

Árið ið fór

Sum heild hevur annars gingið hampuligt hjá Lágargarði. Bíðilistin er tó enn líka langur, og tey 10 plássini á Tjarnargarði hava ikki gjørt nógvan mun.

Eisini Jespersen fekk vitjan henda dagin

Nógv búfólk og avvarandi vóru við til jólahaldið á Lágargarði